# Siga einki um prís

**Einki frættist um prísin fyri at koyra undir Vestmannasundi, tá undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu. Men nú verður tað skjótt kunngjørt, sigur stjórin fyri Vágatunlinum**

NÝTSLUGJALD
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað ber enn ikki til at fáa at vita ein nágreiniligan prís fyri at koyra undir Vestmannsundi, hóast nú er minni enn ein mánaði, til latið verður upp.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunlinum, sigur, at teir vilja hava so nógvar og gjølligar upplýsingar, sum yvirhøvur til ber, áðrenn farið verður út við nøkrum føstum prísi.

– Tað er fyri at kunna koma við einum røttum tali, tá vit kunngera tað, sigur hann, og ikki liggja og broyta fleiri ferðir.

Dávur Reinert Hansen sigur tó, at roknað verður við, at 350 bilar fara at koyra gjøgnum tunnilin um dagin, og út frá tí verður so kostnaðurin settur. Hetta atlið - 350 - er komið fram eftir kanningar umborð á Ternuni, sum í dag siglir um Vestmannasund.

Kannað er eftir hvussu nógvar bilar, ferjan flytir, og á leið tað sama verður so roknað við, at talið fer at liggja, sum fer at koyra undir sundið. Eisini eru fólk spurd, hvussu tey fara at ferðast aftur og fram, eftir at tunnullin er latin upp, sigur stjórin fyri Vágatunlinum. Og tær kanningarnar benda á, at bilatalið, sum frálíður, fer at liggja um teir 350 um dagin fyri eitt heilt ár.

Dávur Reinert Hansen væntar tó at fyrstu tíðina, serliga nú um jóltíðir, verður nógv ferðsla, men hon fer at stabilisera seg sum frálíður.

Hann heldur ikki, at tað er rætt at meta um ferðsluna undir Vestmannasundi við øðrum tunlum í landinum sum samanberingargrundarlagi. Tí tað kann ikki sammetast, sigur hann.

Fyri at koma gjøgnum Vágatunnilin skal gjaldast, og tað skal tað ikki aðrastaðni. Og eingin ivi er um, at gjaldið fer at minka nakað um ferðsluna, vísir stjórin á.

Annars sigur hann, at ætlanin er ikki á nakran hátt at forða ferðsluni undir Vestmannsundi. Sjálvandi vil hann heldur hava tað hinvegin, at so nógv sum gjørligt verður ferðast ígjøgnum.

Tí er hann eisini í móti at kalla innkrevjingarstøðina fyri eina bummstøð. Tí ein bummur er forandi, og tað er hendan støðin ikki. Har er eingin bummur, men ein gjaldsstøð, og soleiðis vil stjórin fyri Vágatunlinum fegin, at tað verður nevnt.

Gjaldsstøðin verður nú sett upp á Vágalandinum, og um mánaðarskiftið ella so fara fólk frá Landsverkfrøðinginum at seta upp bilverju fram við tunnilsvegnum av Fútakletti suður til tunnilsmunnan. Hetta verður gjørt við amboðum, sum leigað verða úr Noreg.

At latið verður upp tann 10. december væntar stjórin fyri heilt vist. Nú gongur aftur rættiliga væl, men okkurt tekniskt verður tó eftir. Soleiðis verða ikki allar stýriskipanir klárar, men tað verður so gjørt aftaná, so hvørt alt er komið.

– Tað vera slík smáting, sum gerast kunnu meðan stongt verður onkra nátt inn ímillum, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum.



*Nú manglar so litið í, til vit kunnu siga, hvussu nógv tað fer at kosta at koyra gjøgnum Vágatunnilin, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunlinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Dýrt bussamband




*Strandfaraskip Landsins brúka árliga milliónaupphæddir til eykabussar*

**Strandferðslan brúkar nógvar pengar til eykabussar fyri at nøkta tann tørv, sum er uttan fyri regluligu rutukoyringina. Eitt nú í samband við miðnámsskúlarnar**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Eysturoy:** Bara eykabussarnir í samband við miðnámsskúlarnar á Kambsdali kosta 1,2 millión um árið, verður upplýst av Strandfaraskipum Landsins.

Tað verður ofta fýlst á, at ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum er trupul at fylgja, og at eitt nú skúlanæmingar kunnu ikki brúka bussarnar.

Verður hugt í ferðaætlanina hjá Strandferðsluni, er skjótt at fáa hesa fatan váttaða. Eitt nú um tú hyggur at sambandinum millum Funning og Kambsdal. Tað ber, sambært vanligu ferðaætlanini, ikki til at brúka buss, um tú eitt nú býrt í Funningi og gongur í skúla á Kambsdali.

Men nú er støðan ikki heilt so einføld, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins. Strandferðslan brúkar heilt nógvar pengar upp á eykabussar, skúlabussar, sum ikki standa í ferðaætlanini.

Serliga vísir hann á skúlarnar á Kambsdali, har nógv fólk ferðast til og frá hvønn dag. Bara í tí sambandinum brúkar Strandferðslan meira enn eina millión krónur um árið til eykabussar.

– Men her er sum alla aðrastaðani tann regla galdandi, sigur Poul Jákup Thomsen, at vit eiga ov lítið av pengum til at nøkta tørvin hundrað prosent. Vit mugu velja, hvussu vit leggja føstu ruturnar, soleiðis at tað passar saman allastaðni. So verður tað viðhvørt neyðugt at leggja okkurt øki burtur ímillum. Tað kann so ofta verða øki, har ikki so nógv fólk býr.

Venda vit so aftur til gjørda dømi okkara í Funningi, vísir ferðaætlanin, at ikki ber til at búgva í Funningi og brúka almenna bussambandið á Kambsdal, tá farast skal í skúla á morgni.

Bussur fer úr Funningi klokkan fimm minuttir yvir sjey. Millum Fjarða er einki steðgipláss, so neyðugt er at fylgja við á Oyrarbakka, har komið verður klokkan hálvgum átta, og skiftast kann í leið 400. Men tann bussurin er longu farin av Oyrarbakka klokkan sjey, og eingin er aftur fyrr enn tíggju minuttir yvir hálvgum níggju. So har gerst einki.

Men her er tað so, at Strandferðslan kemur við eini eykatænastu og sendir ein eykabuss av Oyrarbakka klokkan tíggju minuttir yvir hálvgum átta. Og hann er á Kambsdali til skúlatíð.

Og soleiðis verður eisini gjørt nógva aðrastaðni í landinum, greiðir Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari, frá. Tey, sum brúka bussarnar, vita tað, men tað gera so nógv onnur ikki.

– Millum annað tí hoyra vit ofta søgur um, hvussu illa alt passar, hóast tað ikki passar, at ferðaætlanin ikki passar.

Og tað passar.

# Glyvursvegurin – nýggja farleiðin hjá argjafólki



*Á hesari tekningini sæst, hvar Glyvursvegurin fer at liggja. Enn er ikki tikin endalig avgerð um eitt nú rundkoyringar, men hetta er so ætlanin. Tað framgongur av tekningini, at ein rundkoyring verður gjørd., at har Velbastaðvegurin og Marknagilsvegurin møtast, og Glyvursvegurin gongur harfrá hvørturum Sandá og verður knýtt í Reynsgøtu, har ein rundkoyring eisini verður gjørd. Rundkoyringin á Argjum fer at vera miðskeiðis millum Hebron og barnagarðin og Àarrás og Løkjatún. Síðani gongur vegurin omanfyri verandi veg og hús út á Hamaran og út móti Glyvursnesi.*

*Tekning: Tórshavnar kommuna/Landsbyggifelagið.*

**Tekniskanevnd hjá Tórshavnar býráð hevur einmælt samtykt at farast skal undir arbeiðið at gera Glyvursvegin, sum skal knýta Argir í verandi ringveg og gevur betri atkomumøguleikar til og frá Argjum**

VEGUR
*Heri á Rógvi*

Tekniskanevnd hjá Tórshavnar býráð hevur einmælt samtykt at farast skal undir arbeiðið at gera tann sokallaða Glyvursvegin.

Talan er um eina slóðbrótandi verkætlan, tá hugsað verður um verandi vegakerv og atkomumøguleikararnir til og frá Argjum.

Sjúrður Olsen, formaður fyri tekniskunevnd, sigur, at endalig avgerð nú er tikin um at fara ígongd við arbeiðið, og nevndin hevur eisini samtykt linjutekningina fyri vegin.

Vegurin verður av formanninum í tekniskunevnd róptur fyri ein innari ringvegur. Glyvursvegurin skal knýta Argir og ringvegin, t.e. Marknagilsvegurin í hesum førinum, saman.

Ein partur av verkætlanini verður ein brúgv um Sandá, sum eisini er gamla markið millum Havnina og Argir.

Sum tað eisini sæst á kortinum, so fer Glyvursvegurin at vera nakað omanfyri kirkjugarðin við Velbastaðvegin. Vegurin gongur so tvørturum Sandá og verður knýttur saman við Reynsgøtu, har ætlanin er at hava eina rundkoyring. Vegurin heldur síðani áfram nakað omanfyri verandi veg. Vegurin fer at vera skamt omanfyri samkomuhúsið Hebron og Vørubrekku. Glyvursvegurin verður knýttur saman við verandi veg út á Hamaran, men heldur fram omanfyri verandi veg út móti Glyvursnesi.

### Liðugt í 2004

Í fyrsu atløgu er ætlanin at gera tann partin av verkætlanini, ið knýtur nýggja vegin saman við Reynsgøtu.

Sjúrður Olsen upplýsir, at arbeiðið eftir ætlan verður bjóðað út í januar. Kostnaðurin verður fyribils mettur til at liggja einastaðni millum 10 og 11 milliónir. Tað hevur stóran týdning fyri kostnaðin, hvat fyri slag av brúgv, valt verður at gera um Sandá.

—Vit hava sett fimm milliónir av til vegin í 2003, og restin verður so sett av á fíggjarætlanini fyri 2004, sigur Sjúrður Olsen.

Roknað verður við, at hesin fyrsti parturin av Glyvursvegurin verður liðugur einaferð í 2004. Sjúrður Olsen sigur seg ikki kunna siga nakað nærri um, nær í árinum vegurin verður liðugur.

Enn er ikki greitt, nær farið verður undir at restina av Glyvursvegnum. Sjúrður Olsen sigur, at metingarnar higartil benda á, at kostnaðurin fyri at allan Glyvursvegin lidnan fer at liggja um 14 milliónir.

—Vit vilja leiða ferðsluna betri í býnum, og geva øllum økjum betri atkomumøguleikar, sigur Sjúrður Olsen, tá spurt verður um orsøkina til, at farið verður undir at gera Glyvursvegin.

—Tað hevur víst seg, at ringvegurin hevur minkað nógv um trýstið í býnum. Tað er proppur í býnum, tá arbeiðið skal gerast á ringvegnum, og neyðugt verður at lata aftur á summum vegastrekkjum, sigur Sjúrður Olsen.

Eftir føroyskum metum er Argir eisini ein stór bygd, og higartin hevur bert verið tann eini møguleikan at ferðast til og frá, men hetta verður bert í eina tíð afturat.



*Formaðurin í Tekniskunevnd hjá Tórshavnar býráð, Sjúrður Olsen, metir hendan vegin hava sera stóran týdning fyri betri at kunna skipa nógvu ferðsluna í høvuðsstaðnum. Hann er her avmyndaður við Velbastaðvegin, har Glyvursvegurin verður knýttur saman við verandi ringvegi.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*